

## Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

Skeið fyri fólk í byggivinnuni -

### Vátrúmskonstruktiónir

**Endamál**

- endamálið við skeiðnum er at seta fokus á sjálva undirgólvskonstruktiónina og tilhoyrandi veggir, (í fyrsta lagi løtt vátrúm)
- at seta fokus á hóskandi uppbygging av konstruktiónum, tilfari og tørvandi ástøðiligari bakgrund (í fyrsta lagi løtt vátrúm)
- at seta fokus á góðskutrygging og góðskueftirlit

**Grundleggjandi krøv og tilmæli**

- heildarøkonomi - prosjektering
- tilfarskrøv - lógarkrøv/tilmæli um hall, hyljavirkningur, avslutningar v.m.
- góðskutrygging - góðskueftirlit
- góðskueftirlit í praksis
- royndarskifti/kjak - eftirmeting

**Tið:** 31. mars og 1. apríl 2005, kl. 9-16
**Stað:** Tekniski Skúli, Trædeildin
**Lærari:** Atli Poulsen
**Kostn.:** 3.000,- íroknað frálæru, tilfar og mat
**Tilm.:** áðrenn 17. mars 2005

**Lesið meira um skeiðið á okkara heimasíðu**
**www.skeidsdepilin.fo**

TEAM85

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo, www.skeidsdepilin.fo

---

## Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara. Høvuðsuppgávan verður at taka sær av dagliga arbeiðinum við blaðnum.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 1. mars, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

---

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin*

FØROYA LANDSSTÝRI

# Fíggjarfulltrúi

## til Deildina fyri sinnisveik og Stuðulsskipanina fyri vaksin

Deildin fyri sinnisveik umsitur sambýlið á Fobbakletti í Sandavági. Harafturat hevur stovnurin framhaldandi eftirlit við bústovnunum á Fugloyarvegi og í Torfinsgøtu í Tórshavn og sambýlunum Sólteigur og Eysturstræti í Tórshavn.

Stuðulsskipanin fyri vaksin hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan til heimabúgvandi persónar millum 18 og 66 ár um alt landið. Í løtuni eru uml. 100 persónar, ið fáa stuðul frá skipanini.

**Arbeiðið hjá fíggjarfulltrúanum fevnir um:**

- At leggja roknskaparhaldið hjá Deildini fyri sinnisveik og Stuðulsskipanini fyri vaksin tilrættis sambært roknskaparreglum landsins og at menna hetta samsvarandi hesum.
- At hava mánaðarligt eftirlit við rakstrinum hjá stovnunum.
- At gera mannagongdir og vegleiðingar v.m. og verða við til at seta tær í verk.
- At fyriskipa fíggjarlógararbeiðið.
- At tryggja eitt so einsháttað og gjøgnumskoðiligt datagrundarlag sum gjørligt.
- Árliga góðkenna roknskapir hjá sjálvsognarstovnunum mótvegis leiðaranum.
- At lýsa og greina fíggjarstøðurnar, virksemi og tænastustøðið hjá stovninum.
- Skrivari hjá leiðaranum.

**Førleikakrøv**
**Vit vænta at:**

- Tú hevur evni at greina og arbeiða við tølum.
- Tú dugur væl at orða teg skrivliga og munnliga.
- Tú hevur eina positiva menniskjafatan.
- Tú arbeiðir skipað og hevur hug at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi.
- Tú er opin og virkisfýsin.
- Tú trívist í einum virknum og jaligum arbeiðsumhvørvi.
- Tú hevur góð samstarvsevni.
- Tú hevur eina viðkomandi útbúgving og royndir innan fíggjararbeiði og almenna umsiting.

**Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin kann bjóða:**

- Ein virknan starvsfólkahóp við humor og umsorgan fyri hvørjum øðrum.
- Tvørfakliga supervision.
- Eitt gott og mennandi arbeiðspláss í støðugari broyting.

**Lønar- og setanartreytir:**
Talan er um eitt fast starv innan Heimarøktina og Serforsorgina.

Løn sambært Starvsmannafelagnum og/ella Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum og Fíggjarmálaráðnum.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá leiðaranum Regin Johansen, tlf. 354020.

Starvið verður sett 01.04.2005 ella skjótast aftaná.

Umsóknarfreistin er sett til fríggjadagin 18.03.2005 og umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Deildin fyri sinnisveik/Stuðulsskipanin fyri vaksin**
Att. Regin Johansen
Løkjatún 1, 160 Argir

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo